## DAGSINS MEINING

# Nú er well !

Tað frættist í farnu viku, at sambands og javnaðarflokkurin umhugsa sína støðu í grundlógarnevndini. Samstundis er eitt eljustríð um, hvussu fjølmiðlarnir skulu bera seg at í politisku debattini, eitt stríð um atferð, eitt stríð um hatur og briksl.

Vit mugu tí siga sum maðurin á sinni: nú er well!

Kjak er gott, og at stríðast fyri politiskum sjónarmiðum er gott, men tað skal valdast.

Ríkisfelagsvongurin í løgtinginum eigur at taka fullan lut í grundlógarnevndini. Tann nevndin kann gerast ein platformur fyri politiskum semingsroyndum í Føroyum. Allir floksformenn sita nú í nevndini og arbeiða víðari við nøkrum tankum, sum hava búnast í nøkur ár. Tann hugfarsligi fólkalívsfrøðingurin sum formaður og tey fólk, hann hevur havt afturat sær, hava klárað at gróðursett nakrar teoretiskar tankar, sum nú eru um at vera búnir politiskt.

Hans Pauli Strøm legði á ráðstevnuni hjá nevndini í vár fram sítt boð uppá eina semju, og fólk í øllum politiskum heraðshornum tóku undir vit hansara ella líknandi tankum.

Nú er so kjansurin at fáa loyst tann politiska knútin, sum hevur bundið okkum fast í botn tjóðskaparliga í so nógv ár. Lagt er upp til, at vit semjast um nøkur viðurskifti. Man skal siga, hvør vit eru, og hvar vit eru, og hvar vit kunnu fara.

Allir flokkar mugu fáa sítt. Serliga týðandi fyri sambandsflokkin er ikki at brúka orðið grundlóg. Fyri allan ríkisfelagsvongin betýðir tað nógv at staðfesta, at tá man broytir støðuna er tað ikki líka so lætt sum at broyta vanligar lógir. Til hetta skal onkur serstøk mannagongd skipast., helst við eini bindandi fólkaatkvøðu.

Fyri sjálvstýrisflokkarnar er tað viktugt at samtykkja, at vit eru eitt fólk, vit hava rætt at gera av okkara egnu lagnu, at vit í Føroyum eru samd um tað. Orð sum tjóð og sjálvsavgerðarrættur eiga at verða nevnd.

Her mugu øll vera við. Tað ber heilt einfalt ikki til, at vit ikki kunnu semjast um hesi viðurskftini og um eina nýggja stýrisskipan fyri Føroyar. Hetta landið er ikki nóg væl stýrt, og er tað nakað, sum tey fólkavaldu skulu taka sær av, so er tað sjálvari skipanini – herundir eini tjóðskaparligari semju.

Sambands- og javnaðarflokkurin eiga tí at fara uppí royndirnar at fáa tjóðina at semjast.

Í Suðurafrika skipaði Nelson Madela fyri eini nevnd at skapa "Sannleika og Semju". Grundlógarnevndin kann síggjast sum okkara Sannleika og Semjunevnd.

Semjan má tó eisini røkka nógv longur. Semjan má røkka til, at fólk, sum hava skeldast og barst síðani valið í 1998, ella kanska longri síðan, binda frið og semjast. Ongin má taka patent uppá at hugsa um vælferð, ongin má taka einkarrætt uppá at vera føroyskur, ongin má siga seg vera meiri verdan enn onnur sum menniskja, politikari ella føroyingur.

Serliga skal frá Sosialinum ein hond til semju og brøðralag verða rætt út til øll fullveldissinnað í Føroyum. Farnu árini hava verið ein kampur, og nógv av okkum hava reagerað við kenslum. Fullveldi, ríkisfelagsskapur og vælferð – hesi hugtøkini sita í merginum og í sálini. Tí reagera fólk ofta ov harðliga, tí kemur briksl, og tí kemur hatur ella kenslan av hatri fram.

Sosialurin skal tí sum tann fyrsti royna at ganga í seg sjálvan í leitan eftir sannleika og semju og sløkkja og útihýsa hatri.

Lat okkum semjast. Lat okkum koma víðari. Lat okkum gera eitt nationalt kompromis.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Føroyska Sjómanskirkjan – rætting av kunningarskrivi

**Jógvan Fríðriksson**
*Gjaranes 25. sept. 2003*

Í kunningarskrivi dagfest á Gjaranesi hin 10. sept. 2003 stendur at lesa í fyrsta reglubroti: »Hin 14. september 2003 varpar hin Føroyska Sjómanskirkjan (FSK) ljós á søguna og arbeiðið hjá sjómanskirkjuni. FSK varð stovnað í Runavík hin 8. juli 1981. Tess vega hava vit valt Glyvra kirkju sum karm um hátíðargudstænastuna. Umboð fyri kirkjuráðini, prestar og onnur innboðin verða til gudstænastu saman við kirkjuliðnum á staðnum.

Hin køni lesarin veit, at FSK varð stovnað á prestafundi í KFUK í Tórshavn hin 2. juni 1981, og fyrsta nevndin varð vald sama dag. Hetta stendur at lesa sum inngangur til sjálva reglugerðina, ið seinast varð dagførd 29. juli 2001 á ólavsøkukonvent í Bispagarðinum.

Hin 8. juli 1981 varð so hin fyrsti nevndarfundurin hildin á Sjómansheiminum í Runavík. Talan er sostatt um nevndarfund og ikki stovningardag.

Biðið verður um umbering fyri hetta mistakið, sum hervið verður rættað. Undirritað hevur ábyrgd av mistakinum.

# Jan Muller —skamma teg!

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Sambart Sjúrða Skaale superserfrøðingi, er tað er øðiligt, sum Jan er frekur.

Sum blaðstjóri og journalistur átti Jan Muller at kent ábyrgd. Hendan ábyrgd átti at víst seg við, at hann ikki setti fram spurningar um politikk samgongunnar.

Tá tey útvaldu í Tjóðveldisflokkinum ikki seta spurningar fram, so er greitt, at Jan og onnur í seta fram spurningar eru frek, óseriøs og hatursfuglar. Eisini skulu hesi standa skúlarætt fyri super serfrøðinginum S Skaale. Og tá skulu tey ikki seta spurningar, men tey skulu tvørturímóti svara spurningum, ið Sjúrður Skaale setir vegna tey útvaldu. Og um Jan ikki svarar — so vísir hann veruliga hvussu stórt hansara ábyrgdarloysi er. Um lógarmál vóru ivirtikin og løgreglan føroyskt — so kundi nakað veruligt gjørt við hendan trupulleika.

Í fullveldinum skal alfabeti endurskoðast. Og har verður ikki pláss fyri nøkrum spurnaðartekni.

Tig og arbeið

Arbeit macht frei —

Null fólkaatkvøða — null demokrati — og null spurningar — null Jan M.

Mæ,mæ,mæ - so einfalt.

Ella er tað nú so einfalt Sjúrður Skaale?

# Suðuroyggin – ein kommuna, sjálvsagt!

**Finnleif Guttesen**



Hvør og hvat skuldi forða fyri tí?

Danjal Bjarkhamar (DB), býráðslimur í Vági, leggur upp til áhugavert tjak um samanlegging av kommununum í Suðuroy (dimma 27.sept.03).

Eg má viðganga, at eg bleiv vónbrotin tá DB í síni ari grein bert vendur sær til helvtina av suðuroyingunum, ístaðin fyri til øll sum búleikast á hesari vøkru oyggj.

Um Suðuroyggin var ein samla eind,-og hvat skuldi forða fyri tí,- høvdu vit staði sterkari í allar mátar.

Eg eri samdur við DB tá ið hann sigur, at vit skulu síggja eina samanlegging sum eina avbjóðing, ein møguleika at menna umstøðurnar, men ikki bert hjá einum ávísum parti av teimum sum búgva í Suðuroy, men í allari Suðuroy.

Eg havi tí ein spurning til DB um, hví hann bert vil vera við til at menna umstøðurnar hjá helvtini av teimum, sum búleikast í Suðuroy?


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Tórshavnar Sløkkilið 70 ár



*Tórshavnar Sløkkilið í 1950. Uppi í lastini: Martin Mortensen, Thorstein Mortensen, Christian (Kiss) Samuelsen, Jacob Midjord og Jacob Simonsen. Framman fyri bilin: Kaj Christiansen, Gregorius Gregoriussen, Johan S. Michelsen, Erik Landau, fúti, André Andrésen, brandmeistari, Zacharias Reynagarð og Ole Arge.*
*Mynd: Tórshavnar Sløkkilið 50 ár*



*Gamla sproytan frá 1776 varð seinastu ferð brúkt til eldsløkking á Velbastað í 1939. Her standa Johan Shell, Rubek Rubeksen og Jón Hansen við gomlu sproytuni*
*Mynd: Tórshavnar Sløkkilið 50 ár*

**Mikudagin 1. oktober frá kl. 15 til 17 hevur Tórshavnar Sløkkilið almenna móttøku við Oyggjarvegin í sambandi við, at tað í ár eru 70 ár síðani, at Tórshavnar býráð gjørdi av at skipa eitt fast sløkkilið í býnum**

TÍÐINDASKRIV

Tað var í 1933, at Sløkkiliðið varð stovnað. Men nógv er broytt síðani Johan Shell, Rubekk hjá Mouritsi, Bil-Óli, Zacharis Reynagarð, Anton og André Andresen og aðrir góðir havnarmenn vóru sløkkiliðsmenn í býnum og høvdu sproyturoyndir úti á Reyni.

Tá Tórshavnar Sløkkilið í 1948 fylti 15 ár, flutti støðin í Varðagøtu, har p/f Wenzel Petersen hevði havt bil- og verkstað í nøkur ár. Verkstaðið varð innrættað til brandstøð, og vóru umstøðurnar eftir tátíðarinnar krøvum góðar.

Í Varðagøtu húsaðist Sløkkiliðið tey næstu nógvu árini, til flutt var niðan á Oyggjarvegin í desember 1994.

Men Brandstøðin er ikki bara eldur og eldsløkking. Har er eisini eitt stórt savn við ellisakførum, tí seinastu árini er nógv gjørt burturúr at seta gomlu sløkkiliðsbilarnar í so góðan stand, at teir kunnu koyra. Somuleiðis er øll tann gamla útgerðin og amboð, sum ikki verða nýtt í dag, savnað á støðini.

Fyri rættiliga at markera dagin, fær støðin ein nýggja brandbil við allari hugsandi útgerð, og kemur hesin bilurin at standa í túninum saman við øllum hinum 15 bilunum.

Í sambandi við 70 ára dagin verður sum sagt opið hús á Brandstøðini mikudagin 1. oktober. Nógv er at síggja á støðini, og gleðir starvsfólkið seg at síggja fyrrverandi starvsfólk, vinir og kenningar henda dagin.




*Við Norrønu mánadagin kom hesin Mercedes Benz brandbilurin. Bilurin er uppbygdur í Danmark hjá Ringe Karrosseri á Fyn. Hann er ein 4x4 við automatiskum girum. Tangin er 2000 litrar*
*Mynd: Tórshavnar Sløkkilið*